# Ársfrágreiðing 2021




BÝAR
BÓKA
SAVNIÐ

**Býarbókasavnið**
Niels Finsens gøtu 7
100 Tórshavn
Tel. 302030
bbs@bbs.fo
www.bbs.fo

BÝAR
BÓKA
SAVNIÐ

# Ársfrágreiðing 2021

Eitt bókasavn í menning .... 4
Barnabókasavnið mennist alsamt .... 5
Framtíðarkósin hjá Býarbókasavninum .... 5
Fólkabókasavnið í broyting .... 7
Farið varð undir ungdómsdeild .... 8
Rokaligt vegna umbygging .... 9
Nólsoyingar fingu bókasavn .... 9
Miðlan av bókasavnstilfari .... 11
Fjarlesistova hjá Tjóðskjalasavninum flytur inn á Býarbókasavnið .... 13
Bøkur á pólskum, rumenskum, thailendskum og tagalog .... 14
Johanna Cathrina gavst fyri aldur .... 15
Spælistovan opin hvønn dag .... 17
Um Býarbókasavnið .... 18
Býarbókasavnið umfatar pr. 31. desember 2021 .... 18
Á Býarbókasavninum eru tríggjar deildir .... 18
Upplatingartíðir .... 18
Missión og visión .... 19
Søga .... 20
Virksemi .... 21
Útlán og vitjandi .... 21
Nevndir .... 22
Tænastur .... 22
Nettænastur .... 24
Samstarv .... 24
Tiltøk í 2021 .... 25
Onnur átøk .... 33
Størv .... 37
Skeið og førleikamenning .... 38
Hini bókasøvnini í kommununi .... 39

# Eitt bókasavn í menning

Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Bókasavnið er ein væl vitjaður stovnur, sum er vorðin ein týðandi partur av lívinum hjá havnarborgarum og øðrum við. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meira sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meira nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Síðan 2011, tá veghæddin varð endurnýggjað og nútímansgjørd, hevur eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum verið hølisviðurskiftini, sum í mong ár hava forðað fyri áhaldandi menning. Á hvørjum ári hevur mál- og avrikssáttmáli verið gjørdur og undirskrivaður millum leiðsluna á Býarbókasavninum og kommunalu fyrisitingina. Í sáttmálanum verður raðfest og stungið út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti. Sum liður í eini stigvísari heildarætlan fyri Býarbókasavnið, sum leiðsla og fyrisiting hava gjørt í felag, var fyrsta raðfesting í 2021at gera neyðugar umvælingar og at menna og lata upp ungdómsdeild,. Eisini varð miðað ímóti at gera teir fysisku karmarnar á veghæddini meira innbjóðandi. Onnur týðandi mál, sum bókasavnið setti sær fyri hetta tíðarskeiðið, var at betri um lesi- og lestrarumstøður, t.e. at bøta um umstøðurnar til lesing og djúphugsan á staðnum. Hugtakið um eina sonevnda stillastovu á bókasavninum stakk seg upp. Eisini varð stórur dentur lagdur á at menna miðlanina av tilboðum og tiltøkum hjá bókasavninum. Harumframt varð miðað ímóti at samstarva við aðrar stovnar um átøk og um bókasavnsmál, eitt nú eisini at menna bókasavnstænastu uttan fyri Býarbókasavnið, m.a. við at lata upp deild í Nólsoy og endurskoða bókasavnstilboðið í Kollafirði. Sum henda frágreiðing vísir á, eru fleiri av hesum málum í áhaldandi menning, og summi eru eisini rokkin.

# Barnabókasavnið mennist alsamt



Serliga barnabókasavnið hevur seinastu árini verið í stórari menning. At fleiri fermetrar vórðu lagdir aftur at barnabókasavninum á 3. hædd fyri fáum árum síðani hevur ført við sær eina økta nýtslu og eitt breiðari útboð av tilboðum til minstu borgararnar í kommununi. Barnabókasavnið er í dag meira enn nakrantíð ein týðandi táttur og stórur partur av gerandisdegnum hjá børnum og barnafamiljum, hjá stovnum og skúlum í kommununi. Nógv fólk brúka dagliga barnabókasavnið og tilboðini har.

Sum við øðrum pørtum av bókasavninum tørvar barnabókasavninum betri hølisviðurskifti. Verandi hølisviðurskifti eru merkt av eini ad hoc-tilgongd, har bókasavnið er flutt inn í høli, sum ikki upprunaliga eru innrættað at vera barnabókasavn. Tørvur er á eina heildarhugsan av barnabókasavninum, so hølisviðurskiftini eru á hædd við nútímans barnabókasøvn í londunum kring okkum. Spælistovan hevur verið nógv brúkt og hevur verið til stóra gleði fyri barnafamiljur, sum ikki hava børn á stovni. Matpakkarúmið verður dúgliga vitjað av stovnum, familjum og einstaklingum. Tá okkurt tiltak er á skrá, verður rúmið gjørt til framførsluhøli. Leikasavnið er eisini ein sólskinssøga, har børn og familjur kunnu læna dygdarleikur, eins og tey læna eina bók.

Barnabókasavnið rúmar nógvum og kann eina rúgvu. Tískil hevði ein heildarhugsan av triðju hæddini verið kærkomin fyri at menna og geva barnabókasavninum teir karmarnar, sum ein so týðandi staður hevur fyri so nógvar borgarar. Í ár varð sett hol á hesa menning, tá farið varð undir at umvæla og nútímansgera vesini.

# Framtíðarkósin hjá Býarbókasavninum

Umframt lógarásettu karmarnar, sum áleggur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamiskir deplar, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Deplar, sum hava ein virknan leiklut í nærumhvørvinum, sum teir í størri mun enn áður eru við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og hugdýping og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at nútímans bókasavnsvirksemi.

Henda gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbókasavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meira opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni ger um seg við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini virknari heimasíðu og við luttøku á sosialu miðlunum.

Bókasavnið er opið hvønn dag – eisini sunnudagar, og gerandisdagar til út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók. Hetta setir onnur krøv til hølisviðurskiftini.

Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemi tess. Bygningurin er meira enn 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Bókasavnið hevur, eftir at 3. og 4. hædd út móti Sverrisgøtu varð lagt afturat, ikki longur plásstrot, men enn er neyðugt at umvæla og nútímansgera verandi høli. Umvæld og dagførd høli fara at hava við sær eitt fjølbroyttari og betri nútímans bókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsulíknandi uppskot í 2014. Uppskotið gongur teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðug til eitt vælvirkandi bókasavn. Uppskotið hevur í morgin ár verið grundarlag undir teimum smávegis dagføringum, ið hava verið gjørdar hesa tíðina. Í 2021 er tað gleðiliga hent, at farið varð undir at byggja eina spildurnýggja ungdómsdeild á 2. hædd.

Hesi árini, síðan byggiætlanin varð sjósett, hava fleiri royndir verið gjørdar at útvega fígging frá landinum at seta hesa heildarætlan í verk. Fyri at gera fíggingina meira yvirkomiliga varð gjørd ein byggiætlan í fimm stigum. Fyrsta byggistig er umvæling av útveggi móti Niels Finsens gøtu (íroknað sitipláss í vegginum). Bjálving og klæðing. Umvæling av tekju. Nýggja lyftu og trappu. Og útlit eru fyri, at hetta fer at verða sett í gongd.

Samanumtikið er nógv at gleðast um í farna árinum. Nýggjar verkætlanir eru sjósettar. Her hendir nakað á Býarbókasavninum, og vit kýta okkum alsamt at skapa betri karmar og veita uppaftur betri og sjónligari tænastu til borgararnar.

# Fólkabókasavnið í broyting




Kjaktiltak um endamál, uppgávur og raðfestingar var á Býarbókasavninum 17. november. Heitið á tiltakinum var "Fólkabókasavnið í broyting", og Ivan Hentze Niclasen stýrdi kjakinum um fólkabókasøvn, endamál, uppgávur og raðfestingar. Fýra fólk, sum høvdu meiningar og hugsjónir um fólkabókasøvn í Føroyum vóru viði kjakinum
Vónbjørt Vang, býarbókavørður
Sigurð Vang, leiðari á mentanardeildini hjá Tórshavnar Kommunu
Hildur Patursson og
Pætur Marjunarson Dahl, bókasavnsbrúkarar.

Tað var eitt spennandi kjak, og luttakararnir høvdu nógv nýggj hugskot á lofti, sum Býarbókasavnið kann arbeiða víðari við. Samanumtikið kann sigast, at bókasøvnini spæla sín neyðuga leiklut bæði sum ítøkiligt og talgilt rúm hjá borgarum. Siðbundna bókasavnið, sum vit kenna tað, er í støðugari broyting, men neyðugt at at halda fast við kjarnuvirðini, sum eitt fólkabókasavn hevur, og ikki jagstra tíðarandan, samstundis sum vit skulu menna aðrar partar av bókasavninum, eitt nú breiðka um útboðið og gerast meira sjónlig á teimum talgildu pallunum – serliga miðlanin av bókasavnstilfari átti at verið flutt út á talgildar pallar. Í mun til innrætting, umvæling og hølisviðurskifti varð nógv tosað um, at bókasavnið skuldi vera meira innbjóðandi, enn tað er í løtuni.

Tiltakið var partur av skránni fyri Bókadagarnar, sum Norðurlandahúsið skipaði fyri. Kjakið varð stroymt beinleiðis og sæst í fullari longd á: [https://www.youtube.com/watch?v=L-rs7CdhoUo](https://www.youtube.com/watch?v=L-rs7CdhoUo)

# Farið varð undir ungdómsdeild




*Sigurð Vang, mentamálaleiðari, Vónbjørt Vang, býarbókavørður, Heðin Mortensen, borgarstjóri, Gunnar Mohr, stjóri í Sp/f Valaverk, Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini, Martin P. Hansen, stjóri í Sp/f Valaverk og Óli Ludvig, verkætlanarleiðari.*

Leingi hevur verið tørvur á, at ungdómurin fær meira pláss og betri umstøður á Býarbókasavninum. 24. juni 2021 skrivaði Tórshavnar kommuna undir arbeiðstøkusáttmála við Sp/f Valaverk um at innrætta og gera eitt ungdómsbókasavn á 2. hædd á Býarbókasavninum.

Á ungdómsdeildini skulu tey ungu fáa betri og meira hóskandi pláss at vera bókasavnsbrúkarar. Ungdómsdeildin skal vera eitt innbjóðandi stað, sum gevur teimum ungu íblástur, møguleika og umstøður at vera á bókasavninum. Á ungdómsbókasavninum verður, umframt eitt gott úrval av ungdómsbókum á bæði føroyskum, donskum og enskum, eisini rúm fyri borðspølum, lesikrókar og lestrarumstøður.

Í verkætlanini liggja eisini umvælingar av vesum og skiftiumstøðum á barnabókasavinum. Arbeiðið byrjaði í september 2021, og skuldi eftir ætlan vera liðugt um ársskiftið. Samlaða verkætlanin kostar 1,7 mió. kr.

# Rokaligt vegna umbygging



Eitt øki á 2. hædd hevur verið undir umbygging til ungdómsbókasavn, og vesini á barnabókasavninum skuldu eisini dagførast. Tí hevur nógv byggirok verið á Býarbókasavninum seinni helvt av árinum, tá umvælingararbeiðið fór í gongd. Bókasavnið hevur hóast gang og dust verið opið við undantaki á nøkrum heilt fáum døgnum, tá tørvur var á at steingja bókasavnið vegna umbygging. Øll gleða seg at síggja lidna úrslitið.

# Nólsoyingar fingu bókasavn



*Annfinn Brekkstein, formaður í Mentanarnevnd Tórshavnar býráðs, saman við Báru Traustadóttir, skúlabókavørði, sum nú eisini fer at reka bókasavnið í Nólsoy.*

Týskvøldið 13. apríl 2021 læt Nólsoyar bókasavn dyrnar upp á fyrsta sinni. Í hesum sambandi var almenn móttøka í Nólsoyar skúla.

Nólsoyingar hava í longri tíð ynskt sær almenna atgongd til eitt bókasavn, so tað er gleðiligt fyri bygdarfólkið, at hetta umsíðir er vorðið veruleiki.



Nólsoyar bókasavn heldur til í somu hølum sum skúlabókasavnið í Nólsoyar skúla og skal framyvir virka sum ein deild undir Býarbókasavninum í Havn, eins og Kollafjarðar bókasavn hevur gjørt í nógv ár.

Mong høvdu leitað sær niðan á bókasavnið til upplating og hátíðarhald. Vónbjørt Vang, býarbókavørður, legði dent á, at eitt gott bókasavn eigur at vera opið, atkomuligt og vera karmur um góðar upplivingar í mun til bókmentir, vitan og mentanarligar upplivingar. Hugnaliga bókasavnið í Nólsoy hevur góðar karmar til júst hetta, og á Býarbókasavninum fegnast vit um, at bókasavnstilboð er til uppaftur fleiri borgarar í kommununi. Annfinn Brekkstein, formaður í Mentanarnevnd Tórshavnar býráðs, helt eisini røðu og handaði bókasavninum eina gávu.

Í sambandi við upplatingina var eisini hátíðarhald fyri navnframa nólsoyingin Jens-Kjeld Jensen, sum fekk umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2020 fyri at varpa ljós á margfeldið í føroysku náttúruni. Børn í Nólsoyar skúla høvdu gjørt eitt vakurt kort, sum tey høvdu myndprýtt við flogkyktum, og sungu tveir sangir fyri virðislønarvinnaranum.



Bókasavnið heldur til í Nólsoyar skúla, og ætlanin er at hava opið fyri almenninginum eina ferð um vikuna, hvørt týskvøld kl. 17.00-18.30. Tað er Bára Traustadóttir, sum frammanundan rekur skúlabókasavnið á skúlanum, sum eisini fer at røkja almenna bókasavnið.

# Miðlan av bókasavnstilfari




Bókasavnið ger framhaldandi nógv við at miðla tilfar til brúkaran. Í 2021 var uppaftur størri dentur lagdur á at miðla fysisku bókina í bókasavnsrúminum. Hetta verður gjørt við at gera fysiskar framsýningar ymsastaðni í húsinum. Bøkurnar fingu í 2021 størri rúmd á veghæddini og blivu eisini sjónligar út móti gongugøtuni, so at lánarar, sum komu inn, beinanvegin sóu okkurt av tí spennandi og fjølbroytta tilfari, sum bókasavnið hevur til útláns.




Alsamt fleiri og skiftandi framsýningar vóru eisini ymsastaðni í húsinum. Bókasavnið fór í 2021 undir eitt nýtt átak, sum vit nevna skundlán. Hetta er til tann ótolna lánaran, sum vil sleppa undan bíðirøðini eftir teimum mest eftirspurdu bókunum. Skundlán merkir, at lánarar, sum koma inn á bókasavnið, kunnu vera hepnir at finna tøk eintøk av eftirspurdum bókum sum skundlán, men lánarar kunnu einans hava bøkurnar í 14 dagar. Tað eru tær nýggjastu og mest eftirspurdu bøkurnar, sum verða

keyptar í fleiri eintøkum og læntar út sum skundbøkur. Skundbøkurnar standa beint við inngongdina á 1. hædd, og kunnu ikki endurnýggjast ella bíleggjast. Soleiðis koma bøkurnar skjótari út til næsta lánara.




Eisini hevur bókasavið gjørt fitt burturúr at kunna um nýtt tilfar og tiltøk í tíðarritum og bløðum. Millum annað hevur bókasavnið eina fasta mánaðarliga opnu í Dimmalætting, har kunnað verður um virksemið á bókasavninum. Eisini eru temalýsingar í størri tíðarritum – sum eru ætlað serligum brúkarum, eitt nú eldri ella lesandi. Nógv av tilfarinum verður eisini lagt út á sosialu miðlarnar Facebook og Instagram.




Harumframt hava bókavørðir regluligar bókakaféir, har teir viðmæla bøkur. Bókalistar verða gjørdir teimum viðmældu bókunum, sum lánarar eru sera glaðir fyri.

Vegna koronu hevur ikki borið til at havt so nógv tiltøk í 2021, men nøkur tiltøk hava kortini verið, og lesiringarnir hava hitst, tá korona ikki hevur forðað tí.

# Fjarlesistova hjá Tjóðskjalasavninum flytur inn á Býarbókasavnið



*Á myndini síggjast Vígdis Bjarnadóttir, virkandi leiðari á Býarbókasavninum, Sámal Tróndur F. Johansen, stjóri á Tjóðskjalasavninum, Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.*

Í desember 2021 varð samstarvsavtala gjørd millum Tórshavnar kommunu og Tjóðskjalasavnið um virksemi á Býarbókasavninum.

Endamálið var at menna og skipa samstarvið millum Býarbókasavnið og Tjóðskjalasavnið – í fyrsta umfari við fjarlesistovu á Býarbókasavnium til tilfar frá Tjóðskjalasavninum.

Við hesi avtalu fekk Býarbókasavnið uppaftur breiðari brúkaraskara, við eisini at bjóða teimum, sum arbeiða við savnsskjølum, innivist á Býarbókasavninum. Eisini er ætlanin at hava framsýningarmontru og aðra miðling av áhugaverdum skjølum hjá Tjóðskjalasavninum.

Tjóðskjalasavnið hevur til endamáls at tryggja varðveitingina av savnsskjølum, ið hava søguligt virði og hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar. Tjóðskjalasavnið skal syrgja fyri, at varðveittu savnsskjølini altíð eru tøk hjá myndugleikum og almenninginum.

Tjóðskjalasavnið fekk við hesum eyka møguleika fyri at bjóða lesistovubrúkarum sínum enn betri umstøður, við at vera meira sjónlig mitt í býnum og við at bjóða viðskiftafólki góða atgongd og hentleikar. Tænastan verður væntandi klár á heysti 2022.

# Bøkur á pólskum, rumenskum, thailendskum og tagalog



Fyri at stuðla upp undir integratión av tilflytarum og at møta teimum á bókasavninum á móðurmálinum, hevur barnabókasavnið nú eisini fingið eitt savn av barna- og ungdómsbókum á pólskum, rumenskum, thailendskum og tagalog, sum er almenna málið á Filipsoyggjunum.

Í fyrstu syftu er talan einans um umleið 100 bøkur, og tær flestu eru á pólskum og rumenskum. Ætlanin er alsamt at endurnýggja og vaksa um savnið, so úrvalið av bókum á hesum málum fer at verða størri.

Hetta var gjørt í samstarvi við Center for Integration, sum kongliga bókasavnið í Danmark stendur fyri.

# Johanna Cathrina gavst fyri aldur

Á Býarbókasavninum trívast starvsfólk væl og støðast tískil eisini leingi. Eingin tó so leingi sum Johanna Cathrina Mørkøre, sum, tá hon fór frá vegna aldur, hevði verið bókavørður á Býarbókasavninum í 46 ár.

Fríggjadagin 23. apríl var fráfaringarløta fyri henni í Posthúskjallaranum. Familja, fyrisiting, núverandi og fyrrverandi starvsfelagar vóru við til hugnaløtuna í Posthúskjallaranum.



*Johanna Cathrina avmyndað til fráfaringarhaldið í Posthúskjallaranum saman við fyrrverandi og núverandi starvsfeløgum og borgarstjóra.*

Frá 1. august í 1975 til hon fór frá fyri aldur hevur hon verið við til at mynda og ment Býarbókasavnið sum ein týðandi mentanardepil hetta langa tíðarskeiðið, sum fer at tátta í eina hálva øld. Árið fyri hevði hon 45 ára starvsdag, og 16. februar 2021 fylti hon 70 ár.

Borgarstjórin helt fráfaringarrøðu fyri Johannu Cathrinu, har hann millum annað segði:

- At fylgja starvsleiðini hjá tær er sum at fylgja søguni hjá Býarbókasavninum í fimm áratíggju. Ja, nærum eins leingi, og Býarbókasavnið hevur virkað her í miðbýnum, hevur tú verið í starvi.
- Tú hevur sostatt verið partur av og myndað menningina á Býarbókasavninum frá tí tíðini, tá Býarbókasavnið var lutfalsliga nýtt.
- Býarbókasavnið læt upp tann 1. apríl 1969 og hevði sostatt bara verið opið í seks ár, tá tú byrjaði sum nýútbúgvin bókavørður.

- Tú byrjaði sum 24 ára gomul í teimum hendingaríku 70'unum, og hetta var eitt tíðarskeið, har bókasøvn kring allan heim gjørdust meir opin og innbjóðandi við fleiri tiltøkum, serliga fyri børnum og barnafamiljum.
- Í 1970'unum búðu uml. 11.000 fólk í Havn, og Havnin gjørdist ein meira fjølbroyttur og livandi býur, nógv virksemi var í býnum, nógvur ítróttur, tónleikur og sjónleikur settu sín dám á býin.
- Býarbókasavnið gjørdist ein týðandi mentanarstovnur í býnum. Havnarfólk tóku so við og við bókasavnið til sín, og mitt í rokanum vart tú við tínum vituga og nærlagda lyndi, og vart við til at leiðbeina lánarum til júst røttu bókina, ella tilfar um eitt ávíst evni.
- Góðar tíðir vóru í Føroyum í 1980'unum. Havnin vaks, og í 1980 búðu uml. 15.000 fólk í Havn. Bókasavnið mentist nógv hesi árini. Fleiri fermetrar løgdust afturat, og alsamt fleiri bøkur vóru til útláns á bókasavninum.
- Eisini familjan í heiminum á Hvítanesi, har tú saman við manni tínum, Jákupi, setti búgv, vaks í vavi. Marianna varð fødd í 1978, Christina Elisabeth í 1981 og Julianna í 1989. Øll árini hevur tú miðvíst og við nærlagni - saman við Randi Nolsøe - staðið fyri skráseting av bókasavnstilfari, og tað til lítar.
- Umframt tríggjar døtur eigur tú í dag 8 ommubørn, so tú fært ríkiligt at takast við.
- Í 1990'unum vóru ringar tíðir í Føroyum. Hóast hetta keypti bókasavnið sína fyrstu teldu í 1990. Nógv umlegging og umskifting var hesi árini, og tú átti tín virkna lut í at talgilda bókaskránna og at modernisera virksemið til nógv broyttu umstøðurnar.
- Í 1994 fylti Býarbókasavnið 25 ár. Í 1998 fingu brúkarar atgongd til internetið á Býarbókasavninum, og tá varð umsíðir farið frá teimum gomlu kartotekskortunum til at brúka talgildar bókasavnsgrunnar.
- Í 1990'unum og langt inn í nullini eru árini, har KT og tøkni var alvaldandi, og har bókin varð skýrd at vera deyðanum nær, tí nú fór bókasavnið bert at vera virtuelt til staðar úti í einum tykisheimi.
- Bókasavnið var alla tíðina við hesi árini og menti tilboðið til eisini at fevna um talgildar ljóð- og e-bøkur, umframt at bjóða fram ókeypis atgongd til nettænastur.
- 2011 fekk Býarbókasavnið við nýinnrættaðu veghæddini møguleikar at skipa fyri framsýningum, sum tú við eldhuga hevur tikið tær av saman við Maluni Hilmarsdóttir.
- Í 2013 vórðu vælumtóktu lesiringarnir settir á stovn á Býarbókasavninum, og øll árini hevur tú hjálpt til við lesiringunum, har tín lesihugur og holli kunnleiki til bókmentir komu væl við.
- Eisini má nevnast megnararbeiðið at ritstjórna minnisritið, sum Anna Brimnes, fyrrverandi býarbókavørður, skrivaði í samband við 50 ára haldið hjá Býarbókasavninum í 2019. *Býarbókasavnið 50 ár – brot úr søguni.*
- Í arbeiðinum, sum tú gjørdi saman við Randi Nolsøe, komu tínir førleikar sum rættlesari og nærlagdur ritstjóri til sín rætt, umframt at tín stóri tokki til og ansur fyri søguligum viðurskiftum veruliga kom til sjóndar. Ómetaliga nógv er broytt hesi árini.
- Fólkatalið í Havnini er nærum tvífaldað, og Havnin er vorðin ein nýmótans býur, og tá er tað ein sjálvfylgja, at býurin hevur eitt gott nútímans bókasavn at vísa á, og tað er í stóran mun tær fyri at takka, Johanna Cathrina, sum hevur verið við øll hesi mongu ár, at tað er so.
- Tað verður ein stórur missur fyri bókasavnið og allar brúkararnar, nú tú traðkar inn í eitt nýtt tíðarskeið í lívinum. Starvsfólkini á Býarbókasavninum missa ein góðan

starvsfelaga, og stovnurin missir ein sera dugnaligan bókavørð við eini fakligari tyngd, sum ikki er løtt at finna nú á døgum.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, ynskti at enda Johonnu Cathrinu alt tað besta og blíðan byr.

## Spælistovan opin hvønn dag



Spælistovan hevur fingið góða móttøku, síðan hon læt upp í 2019, og nógv hava havt gleði av tilboðnum. Í 2021 varð tískil gjørt av at hava opið mánadag til fríggjadag, og byrjað varð 1. juli 2021.

Spælistovan er ætlað børnum, ið ikki ganga á dagstovni, og foreldrum teirra. Í spælistovuni kunnu vaksin og børn hitta onnur í somu støðu, og á henda hátt er tað eitt gott høvi at samantvinna barnaspæl og prát millum tey vaksnu.

Býarbókasavnið sær hetta eisini sum ein møguleika at vísa bæði foreldrum og børnum møguleikarnar á barnabókasavninum.

# Um Býarbókasavnið

## Býarbókasavnið umfatar pr. 31. desember 2021

- Býarbókasavnið í Havn
- Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn
- Nólsoyar bókasavn
- 10 skúlabókasøvn í Tórshavnar kommunu

## Á Býarbókasavninum eru tríggjar deildir

- Útlán til vaksin
- Barnabókasavn
- Blaðkafé og avgreiðsla

## Upplatingartíðir

| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | 9.00 – 20.00 |
| Fríggjadag | 9.00 – 18.00 |
| Leygardag | 10.00 – 17.00 |
| Sunnudag | 14.00 – 17.00 |

# Missión og visión

Til tess at tryggja borgarunum eina góða tænastu hevur Býarbókasavnið eina missión og eina visión at halda seg til:

## Missión

Býarbókasavnið fremur upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi í Tórshavnar kommunu og í Føroyum annars.

## Visión

Býarbókasavnið skal tryggja øllum borgarum í kommununi og borgarum aðrastaðni frá góða og sjónliga atgongd til upplýsing, lærdóm og mentanartilboð og geva hvørjum borgara sær, uttan mun til aldur, kyn, heilsustøðu ella samfelagsliga støðu annars møguleika fyri djúphugsan og menning av egnum evnum og førleikum.

Til at røkka endamálinum skal Býarbókasavnið hava til taks bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur og annað hóskandi tilfar, sum verður lænt út uttan viðurgjald, og sum umboðar dygd og fjølbroytni og er aktuelt. Átrúnaðarlig, moralsk ella politisk sjónarmið mugu ikki ávirka valið av tilfarinum.

Neyðugt er eisini at hava starvsfólk, sum eru útbúgvin til at savna, skipa, meta um og miðla tilfarið og kunnu geva brúkarum holla vegleiðing í øllum viðurskiftum á bókasavninum. Eisini skal Býarbókasavnið bjóða umstøður, umhvørvi og kunning, sum vekir forvitni og áhuga fyri luttøku í samfelagi og mentanarlívi.

Sum arbeiðspláss skal Býarbókasavnið vera eitt stað, har starvsfólkini sleppa at royna seg yrkisliga og persónliga, og har tey verða vird og sædd bæði sum menniskju og sum fakfólk.

# Søga

| | |
|---|---|
| **1969** | Tórshavnar kommuna setti Býarbókasavnið á stovn 1. apríl. Tað helt til í leigaðum hølum í Niels Finsens gøtu 7. Støddin var 514 fermetrar |
| **1977** | Bókasavnið fór at læna út ljóðbøkur |
| **1990** | Bókasavnið leigaði eina hálva hædd afturat |
| **1993** | Hølini vórðu aftur víðkað, og bókasavnið var nú 813 fermetrar í 4 hæddum |
| **1998** | Alt tilfarið varð skrásett á teldu |
| **2004** | Bókasavnið fór at læna út dvd-filmar |
| **2005** | Nýggj telduskipan varð keypt |
| **2006** | Bókasavnið fekk lyftu |
| **2009** | Kommunan keypti tann partin av bygninginum, sum áður varð leigaður |
| **2010** | Farið varð undir umbygging av hæddini út til Niels Finsens gøtu |
| **2011** | Gøtuhæddin varð tikin í nýtslu í apríl sum partur av Býarbókasavninum |
| **2011** | Sjálvgreiðslur til útlán og innlating av bókum vórðu tiknar í nýtslu í mai |
| **2017** | Opin goymsla læt upp í kjallaranum |
| **2018** | Leikasavnið læt upp |
| **2018** | Matpakka- og framførslurúm læt upp |
| **2018** | Nýggja bókasavnsskipanin Cicero tikin í nýtslu |
| **2019** | Spælistovan læt upp |
| **2021** | Nólsoyar bókasavn læt upp |

# Virksemi




# Útlán og vitjandi

## Útlánstøl

| | |
|---|---|
| Samlað útlán | 52.940 |
| | |
| Útlán vaksin | 32.902 |
| Útlán børn | 20.038 |
| e-bøkur og e-ljóðbøkur | 10.668 |
| Fysiskt tilfar | 42.272 |
| Leikur (Leikasavnið) | 678 |

## Onnur lyklatøl

| | |
|---|---|
| Nýggir lánarar í árinum | 841 |
| Tilfar | 76.069 |
| Burturbeint tilfar | 4.995 |
| Nýggjar bøkur | 4.842 |
| Vitjandi | 81.399 |

Í 2021 síggja vit eina enn størri framgongd í e- og ljóðbókum, sum av álvara tók dyk á seg undir Korona-farsóttini í 2020, tá bókasavnið stóran part av tíðini var stongt ella hevði skerdar upplatingartíðir. E-tilfarið er tí 20% av útlæntum tilfari. Útlánið av fysiskum tilfarið er hækkað eitt vet í 2021.

# Nevndir

Býarbókasavnið hevur umboð í hesum nevndum:

### Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens
Býarbókavørðurin er fastur skrivari í nevndini

### Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs
Barnabókavørður er skrivari í nevndini

### Ráðgevandi nevnd hjá Ljóðbókatænastuni
Bókavørður er limur í nevndini

# Tænastur

Bókasavnið lænir út tilfar til allar aldursbólkar; fagrar bókmentir, yrkisbøkur, ljóðbøkur, dvd-filmar og tíðarrit, umframt talgilt tilfar so sum e-bøkur, ljóðbøkur og filmar. Mesta tilfarið á bókasavninum er á føroyskum og donskum, og í størri mun eisini á enskum. Tú kanst læna so nógvar bøkur, ljóðbøkur, tíðarrit og dvd-filmar, sum tær lystir, og eitt avmarkað tal av talgildum tilfari.

### Blaðkafé
Á 1. hædd er blaðkafé. Býarbókasavnið hevur øll føroysk bløð og tíðarrit og eitt stórt úrval av útlendskum bløðum og tíðarritum. Til ber at læna tíðarrit heim við, tó ikki nýggjasta eintakið. Til ber eisini at keypa drekkivørur og okkurt afturvið.

### Sjálvavgreiðsla
Til ber at bíleggja bøkur og endurnýggja lán av bókum og øðrum tilfari bæði á heimasíðuni ella við at ringja ella senda teldupost til Býarbókasavnið. Fráboðan verður send, tá tað bílagda er tøkt. Bókasavnið kann eisini útvega bøkur frá øðrum bókasøvnum.

Lánitíðin er vanliga ein mánaður. Um eingin annar hevur bílagt tilfarið, kann lánið endurnýggjast. Verður farið út um lánitíðina, verður goldið sambært galdandi takstum. Býarbókasavnið hevur sjálvgreiðslu, har lánarar kunnu avgreiða síni lán sjálvir.

### Lánisamstarv
Býarbókasavnið hevur samstarv um útlán við hesar stovnar í kommununi: Barnatannrøktina, Boðanesheimið, Eldrasambýlið oman Mattalág, Ellisheimið, Heimið við Vallalíð, Lágargarð, Psykiatriska Depilin, Tjarnargarð, Urd, Eldrasambýlið oman Hoydalar og Varðhaldið. Umleið tvær ferðir árliga vitja fólk frá Býarbókasavninum hesar stovnar, undantikið Varðhaldið, har vitjað verður hvønn mánað.

## Bókaberin

Bókasavnið hevur tænastuna *Bókaberin*, tað eru starvsfólk, ið koyra út við bókum, ljóðbókum og tíðarritum. Rørslutarnað og onnur, ið ikki fáa komið á bókasavnið, kunnu melda seg til skipanina. Les meira um tænastuna á www.bbs.fo.

## Leikasavnið

Føroya fyrsta almenna leikasavn læt upp á Býarbókasavninum 15. juni 2018.
Á Leikasavninum ber til at læna dygdargóðar leikur við líknandi treytum, sum tá tú lænir eina bók.

Leikasavnið er partur av átakinum Grøna leiðin, sum er sett í verk sambært umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu, har greið mál eru sett um økta býtisnýtslu.

## Spælistovan

Á spælistovuni hittast foreldur við børnum, sum ikki ganga á stovni. Spælistovan er opin mánadag-fríggjadag. Spælistovan er á 3. hædd, har barnabókasavnið eisini er. Í spælistovuni eru leikur, pútur og madrassur, so góðar umstøður eru hjá børnunum at spæla. Øll børn eru vælkomin saman við foreldrum ella avvarðandi.

## Lestrarhøli

Býarbókasavnið hevur í fleiri ár bjóðað lesandi lestrarhøli í jólafrítíðini. Her hava lesandi sitið í friðarligum umhvørvi og arbeitt við uppgávum og lestri. Í 2021 vórðu innastu hølini á 2. hædd gjørd til lestarhøli burturav, og kunnu lesandi, granskarar og onnur nýta hølini alt árið.



## Matpakkarúm

Eftir at vitjandi leingi høvdu spurt eftir einum matpakkarúmi til børnini, læt Býarbókasavnið í november 2018 upp eitt rúm, har fólk kunnu eta sínar matpakkar. Atgongd er til matpakkarúmið frá barnabókasavninum á 3. hædd. Pláss er fyri umleið 10 børnum umframt starvsfólki, og brúkararnir taka sjálvir upp eftir sær. Vask, lappar, feiiskuffa og ruskspannir eru á staðnum.

## Kopirúm

Bókasavnið bjóðar atgongd til prentara, kopimaskinu, skannara, lamineringsmaskinu, innbindingarmaskinu og teldur við internetatgongd. Prent, kopiering, laminering og innbinding skulu gjaldast hjá starvsfólkinum sambært galdandi takstum.

# Nettænastur

Býarbókasavnið hevur heimasíðu, umframt síður á Facebook og á Instagram.

Á heimasíðuni kann lánarin leita í bókaskránni hjá Býarbókasavninum, bíleggja tilfarog endurnýggja lán. Har eru eisini tíðindi frá bókasavninum, kalendari við komandi tiltøkum, leinki til e-bøkur og annað nettilfar, sum Býarbókasavnið bjóðar lánarum sínum, og vegleiðingar um, hvussu ein brúkar tænasturnar.

Á facebooksíðuni verður kunnað um tiltøk, bæði komandi og farin, og nógvar myndir eru at finna á bæði facebook- og instagramsíðuni hjá Býarbókasavninum.

# Samstarv

Býarbókasavnið samstarvar við fleiri stovnar, kommunur, áhugafelagsskapir og einstaklingar um tiltøk og onnur átøk. Bókasavnið er eisini limur í netverkum og felagskapum, bæði føroyskum, norðurlendskum og altjóða samstarvsnetverkum, sum hava til endamáls at styrkja og menna bókasøvn, bæði ítøkiliga og talgilt.

# Tiltøk í 2021

## 6. - 14. februar

## Vetrarljós 2021




Ljóslistamaðurin Súni Joensen gjørdi eina vakra ljósinstallatión til ársins Vetrarljós. Vetrarljós er kvøldið, tá vit saman við øðrum stovnum og fyritøkum í býnum fagna, at myrka tíðin fer aftur um bak, og gingið verður ímóti ljósari tíðum.

## 10. juli -

## Borðspælskvøld hvørt leygarkvøld

Áhugafelagsskapurin Tabletop Føroyar fór í samstarvi við Býarbókasavnið at skipa fyri borðspælskvøldum í juli 2020.

Tiltøkini vóru ókeypis og skipað soleiðis, at øll kundu møta upp og luttaka í teimum spølum, sum vóru til taks, ella kundu taka sítt egna spæl við.

Býarbókasavnið eigur fleiri borðspøl og spennandi spælibøkur, sum eisini eru til taks og til útláns. Tiltakið hevur síðani fingið so góða undrtøka, at skipað nú verður fyri borðspælskvøldum hvørt leygarkvøld.



**10.-15. februar**

## Føstulávintsklipp á barnabókasavninum



Á barnabókasavninum var høvi at gera grýluskortar. Kartong, lím, skabelónir og annað tilfar var lagt fram til øll, sum høvdu hug at vera við. Hetta er eitt ókeypis afturvendandi tiltak, sum barnabókasavnið hevur staðið fyri í mong ár.

**1. mars -**

## Lesiringarnir byrjaðu aftur

Býarbókasavnið hevur í mong ár skipað fyri lesiringakvøldum, har fólk hava høvi at hittast eina ferð um mánaðin fyri at tosa um eina ávísa bók, sum øll hava lisið.
Tað er ókeypis at luttaka í lesiringi. Bókasavnið leggur høli til og útvegar bøkurnar, ið lisnar verða.
Lesiringarnir hittast fyrsta mánakvøld í hvørjum mánaði.

**29.-31. mars**

## Páskaklipp á barnabókasavninum



Høvi var at klippa páskapynt á barnabókasavninum 29.-31. mars
Kartong, lím, skabelónir og annað tilfar lá frammi.
Øll kundu vera við, stór sum smá, og tað var sum altíð ókeypis.

**31. mars**

## Várbókakafé



Býarbókasavnið skipar regluliga fyri bókakaféum fyri lánarar, sum ynskja íblástur til hvørja bók, tey skulu fara í holt við, tá várið er í hondum.
Á bókakafé geva bókavørðir á Býarbókasavninum lesiprei til heilt røttu bøkurnar til tín.
Bókasavnið bjóðar okkurt at leska sær við, og luttakararnir fáa eisini ein bókalista til íblástur.

**1. og 2. mai**

## Kollasjuverkstova við Kirstini Helgadóttir



Í samband við Umhvørvisvikuna, har dentur millum annað varð lagdur á endunýtslu, valdi Býarbókasavnið at endurnýta burturbeindar bókasavnsbøkur til kollasjulistaverk. Kirstin Helgadóttir, listakvinna, legði lag á.

Kirstin er útbúgvin grafiskur sniðgevi og hevur arbeitt nógv við kollasjum. Tilfar sum lím, saksar og kartong lá frammi saman við myndabókum og bløðum, sum ikki longur eru partur av bókasavninum.

**1. – 8. mai**

## Umhvørvisvikan 2021

Í umhvørvisvikuni 2021 var sjóneykan sett á fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning av burturkasti. Vit skulu duga betur at minka um okkara burturkast við at brúka minni tilfeingi og endurnýta tað, vit hava. Á Býarbókasavninum var í hesum sambandið skipað fyri kollasjuverkstovu, har møguleiki var at gera egin listaverk burtur úr burturbeindum bókasavnsbókum.

**8. mai**

## Á trillubøruferð í Norðurlondum



Norðurlendsk konsert og verkstova ætlað børnum í aldursbólkinum 3-5 ár var leygardagin 8. mai kl. 14.
Ein hugtakandi løtu við frásagnum, sangum, tónleiki og øðrum skapandi ítrivi, serliga ætlað teimum 3 til 5 ára gomlu saman við sínum vaksnu.

Gátuførir eldrevar, hundasleðutúrar, trøllkonur, brattar fjallalíðir, sjóhestar, krabbar, ísbjarnir og stór landakort eru nakað av tí, sum børnini upplivdu á hesi trillubøruferð.

Á trillubøruferð í Norðurlondum er ein ferð í Norðurlondum í eini óvanligari trillubøru. Tey smærru

børnini verða bjóðað við á ferð, har tey kunnu uppliva Norðurlond við frásagnum, sagnum, tónleiki, sangi og øðrum skapandi ítrivi saman við teimum uppfinnsomu og musikalsku gestunum Bergi Fonsdal (FO) og Lone Wernblad (DK).

**Alt summarið**

## Summarkapping – Lesikapping fyri børn og ung




Tað er gott at lesa - og serliga í summarfrítíðini, tá tú hevur frí frá skúlanum.
Fyri at gera tað eitt sindur stuttligari hjá børnum og ungum at lesa skipaði barnabókasavnið fyri eini lesikapping, har ein kundi vinna gávukort á kr. 300 til bókhandlar.

**10. september**

## Skaldborin sjónarhorn – mentanarnátt á Býarbókasavninum



Útsetta mentanarnáttin í Tórshavnar kommunu var fríggjakvøldið 10. september.
Skaldarøddir og sjónarhorn eru nútíðin og geva okkum ein undanráka av framtíðini.
Á Býarbókasavninum var yrkingaupplestur við tveimum ungum yrkjarum: Daniu O. Tausen og Beini Bergsson.

## 13. oktober

### Heystbókakafé

Býarbókasavnið skipar regluliga fyri bókakaféum fyri lánarar, sum ynskja íblástur til hvørja bók, tey skulu fara í holt við, tá várið er í hondum.
Á bókakafé geva bókavørðir á Býarbókasavninum lesiprei til heilt røttu bøkurnar til tín.
Bókasavnið bjóðar okkurt at leska sær við, og luttakararnir fáa eisini ein bókalista til íblástur.

### Søla av brúktum bókasavnstilfari



Fyri at rúma nýggjum, fjølbroyttum og tíðarhóskandi tilfari má Býarbókasavnið regluliga burturbeina bókasavntilfar, antin tí at tað er óaktuelt, ikki verður lænt longur ella tí at tilfarið er ov illa farið.

Sølan av brúktum bókasavnstilfari fer vanliga fram fýra ferðir um árið. Um veturin, várið, summarið og um heystið.

## 31. oktober

### Kollasjuverkstova við Kirstini Helgadóttir

Kollasjuverkstova við burturbeindum bókasavnstilfari. Kirstini Helgadóttir, listakvinnu, legði lag á. Kirstin hevur útbúgving sum grafiskur sniðgevi og hevur arbeitt nógv við kollasjum.

Tilfar sum lím, saksar og kartong lá frammi saman við myndabókum og bløðum, sum bókasavnið hevði beint burtur.

**17. november**

## Pallborðskjak á Býarbókasavninum – Fólkabókasavnið í broyting

Kjakast varð um fólkabókasøvn, endamál, uppgávur og raðfestingar.
Eitt sofaprát millum fýra fólk, sum høvdu meiningar og hugsjónir um fólkabókasøvn í Føroyum vóru við:
- Vónbjørt Vang, býarbókavørður
- Sigurð Vang, leiðari á mentanardeildini hjá Tórshavnar kommunu
- Hildur Patursson
- Pætur Marjunarson Dahl

Ivan Hentze Niclasen, kringvarpsstjóri, stýrdi kjakinum.
Tiltakið var partur av skránni á Bókadøgunum, sum Norðurlandahúsið skipaði fyri.

**20. november**

## Ranvør og Kári á barnabókasavninum




Ranvør Isholm las úr bók síni “Hilda og Monsi”, og Kári Sverrisson spældi nøkur løg.

**26. november**

## Livandi bókasavn



Fríggjadagin 26. november høvdu fólk høvi at koma til eitt hugnaligt og upplýsandi kaféprát við eina »livandi bók« á Býarbókasavninum.
Fólk úr fleiri enn 110 ymiskum tjóðum búgva í Føroyum, og næstan 4% av føroyingum í dag eru fødd í londum uttan fyri Norðurlond. Hetta fríggjakvøldið høvdu fólk møguleikan at hitta nøkur av hesum áhugaverdu

fólkunum. Á bókasavninum bar til at læna eina 'livandi bók' og fáa eitt prát og innlit í ymiskar lívssøgur, lond og mentanir.
Tað var ókeypis at læna livandi bøkur. Bøkurnar kundu einans ´lesast´ á staðnum og í avmarkaða tíð.
Tiltakið var eitt samstarv millum integratiónsøkið hjá Tórshavnar kommunu og Býarbókasavnið.

**10. desember**

## Altjóða mannarættindadagur Skrivikafé – Amnesty International

Ung í Amnesty høvdu skrivikafé á Býarbókasavninum í samband við Altjóða mannarættindadagin. Fróði Bjarnason spældi nøkur løg.

**Desember**

## Jólaklipp á barnabókasavninum

Høvi var at koma inn á barnabókasavnið og gera jólaprýði at heingja upp heima ella á barnabókasavninum. Tiltakið byrjaði leygardagin 28. november og endaði á tollaksmessu.

**Desember**

## Søguløtur í desember 🎄🌟🎄




Mariann Hansen las jólasøgur á barnabókasavninum í jólamánaðinum, og samstundis var høvi at gera sítt egna jólaprýði. Pappír, saksar og lím lógu frammi til børn og vaksin at brúka.

# Onnur átøk

## Lestrarhøli á 2. hædd

Býarbókasavnið hevur í fleiri ár bjóðað lesandi lestrarhøli í longu skúlafrítíðunum. Sera stórur tørvur er á lestrarhølum í býnum, nú Havnin alsamt fær fleiri lesandi, sum hava brúk fyri at hugsavna seg um størri verkætlanir.

Hølini innast á 2 hædd eru nú innrættað, so tey eru tøk hjá lesandi og øðrum at brúka alt árið. Tað er fyrstur fær-reglan, sum er galdandi.

Her kunnu lesandi sita í friðarligum umhvørvi og arbeiða við uppgávum og lestri. Øll, sum eru undir hægri útbúgving, bæði útisetar og lesandi í Føroyum, eru vælkomin at nýta hølini.

## M. A. Jacobsens heiðursløn og Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar Býráðs 2021



Mentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs 2021 vórðu latnar í Müllers pakkhúsi hóskvøldið 7. oktober 2021. Virðisløn M. A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir 2021 varð latin Jógvani í Lon Jacobsen, professara í føroyskum á Fróðskaparsetri Føroya, fyri verkið "Føroysk purisma". Virðisløn M. A. Jacobsens fyri mentanaravrik 2021 varð latin Trond Trosterud, professara í máltøkni á universitetinum í Tromsø. Í 2021 varð eingin virðisløn latin fyri fagrar bókmentir.

Orðingarnar á heiðursbrøvunum ljóða soleiðis:

Fyri yrkisbókmentir:
Virðisløn M. A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir 2021 verður latin Jógvani í Lon Jacobsen, professara í føroyskum á Fróðskaparsetri Føroya, fyri verkið “Føroysk purisma”.
Bókin varpar nýtt ljós á føroyska málsøgu við purismuni sum sáld. Við støði í stórari samanberandi kanning setir høvundurin føroyska purismu í norðurlendskt høpi og gevur soleiðis lesaranum eina djúpari fatan av puristiskum hugburði í samtíðini. Hetta er eitt viðkvæmt evni – er tað føroyskt ella bara orð í føroyskum? Høvundurin lyftir seg upp um ósemjurnar og vísir á, at málvariatión skapar rúmariræsur í málinum. Jógvan í Lon lýsir føroyska purismu við vísindaligum neyvleika og miðlar hana á ein hátt, sum er viðkomandi bæði fyri frøðingin og tann vanliga føroyingin við áhuga fyri málinum.

Fyri mentanaravrik:
Virðisløn M. A. Jacobsens fyri mentanaravrik 2021 verður latin Trond Trosterud, professara í máltøkni á universitetinum í Tromsø.

Sjálvboðin og uttan kostnað hevur hann gjørt ein nýggjan føroyskan rættstavara í samstarvi við Føroyamálsdeildina. Hann hevur gjørt aðrar rættstavarar og tykist hava serligan alsk til fáment mál. Umframt rættstavaran hevur hann ment ein elektroniskan tekstabanka við uml. 10 milliónum føroyskum orðum, har tað ber til at leita og kanna, hvussu orð verða brúkt í føroyskum. Rættstavarin og tekstabankin liggja á netinum ókeypis at brúka. Arbeiðið hjá Trond Trosterud byggir á humanistiska idealismu, málfrøðiligt innlit og ein brennandi áhuga fyri máli.

## Dánial og Annika fingið Barnamentanarheiðurslønir Tórshavnar býráðs 2021




Tvær Barnamentanarheiðurslønir Tórshavnar býráðs vórðu latnar í 2021. Ta fyrru fekk myndlistakvinnan Annika Øyrabø fyri myndprýðing av bókini "Abbi og eg og Abbi", sum Dánial Hoydal hevur skrivað tekstin til. Ta seinnu Barnamentanarheiðurslønina frá Tórshavnar Býráð fekk Dánial Hoydal fyri barnabókina “Abbi og eg og Abbi”.

Mentanarheiðurslønir Tórshavnar býráðs 2021 vórðu latnar í Müllers pakkhúsi hóskvøldið 7. oktober 2021.

Orðingarnar á heiðursbrævinum ljóða soleiðis:
Myndlistakvinnan Annika Øyrabø fær Barnamentanarvirðisløn Tórshavnar býráðs fyri myndprýðing av bókini *Abbi og eg og abbi*, sum Dánial Hoydal hevur skrivað tekstin til.
Annika Øyrabø dugir sjáldsama kynstrið at siga søguna einans við myndum.
Við skuggum og dýpd skapa klippmyndir hennara eitt trídimensionalt rúm, har lesarin fær kensluna av at verða drigin inn í søguna um drongin og abban, sum fær demens.
Bókin er prýdd við hópin av smálutum og smásøgum, eisini symbolskum vísdómslutum sum leykinum og súreplinum, sum til ber at práta við børnini um.

Við broytingum í ljósi og litum, andlitsbrøgdum og eygnabráum lýsir Annika Øyrabø á meistarligan hátt sjúkutilgongdina eins og skiftandi huglagið í søgugongdini, líka frá sorgloysi til ørkymlan, ótta og vón.

Rithøvundin Dánial Hoydal fær Barnamentanarvirðisløn Tórshavnar býráðs fyri søguna *"Abbi og eg og abbi"*, sum Annika Øyrabø hevur myndprýtt.
Í bókini um drongin og abban, sum fær demens, lýsir Dánial Hoydal á ein varligan og virðiligan hátt eitt viðbrekið og viðkomandi evni í barnahædd.
Við lætta og fynduga penni sínum gevur høvundin børnum og vaksnum høvi at práta um fólkasjúkuna demens, sum rakar so mangar familjur.
Dánial Hoydal dugir framúr væl at siga tað álvarsliga við einum dismi av skemti og stuttligum orðaspølum, so vónin fær loyvi at liva. Tá er lættari at skilja og práta um tað, sum nívir.

## Bókajólakalendari




Á jólum bjóðaði barnabókasavnið øllum børnum og barnafamiljum pakkar við 24 bókum, eina til hvønn dag, sum ein bókajólakalendari fyri børn og foreldur í jólamánaðinum.

## Borðspælasavn



Í samband við ungdómsbókasavnið, sum var í umbúna, hevur Býarbókasavnið ognað sær eitt gott bland av borðspølum, sum fólk kunnu læna eins og bøkur, ella spæla á Býarbókasavninum, millum annað á teimum regluligu borðspælskvøldunum, sum áhugafelagið Tabletop Føroyar skipar fyri hvørt leygarkvøld. Savnið verður regluliga dagført, so Býarbókasavnið altíð hevur nýggj ella eftirspurd spøl til útlans.

## Læn ein elorkumátara




Í umhvørvispolitikkinum Grønu leiðini hjá Tórshavnar kommunu er mál sett um at skapa tilvitan um orkunýtslu og orkusparing. Í hesum sambandi er Býarbókasavnið farið at læna út elorkumátarar.

Ein elorkumátari er serliga týðandi fyri húsarhald, ið nýta meira streym enn miðal, ella har elrokningin er hægri enn væntað. Ein elorkumátari er harumframt væl egnaður í sambandi við undirvísing í skúlanum.
Um elorkunýtslan – uttan elbil og hitapumpu – er hægri enn 2.000 kr (1.000 kWh) um árið fyri hvønn persón í húsarhaldinum, eru helst pengar at spara. Hetta krevur tó vitan um, hvar óneyðuga elorkunýtslan er, og tað kann ein elorkumátari vísa. Elorkumátarin vísir m.a., hvussu nógv eitt tól nýtir í krónum og kilowatttímum, og hvussu stórt CO2-útlátið er.
Ætlanin er, at hetta átakið er eitt fet fram ímóti at røkka tí málinum.
Harafturat stuðlar átakið upp undir økta býtisnýtslu; tað merkir, at tað er óneyðugt hjá hvørjum húsarhaldi at eiga sín egna elmátara. Hetta minkar um framleiðslu og nýtslu av rávørum.

## Læn eitt borðtennisbatt



Í oktober 2020 varð farið undir at læna út borðtennisbatt og -bóltar á Býarbókasavninum í sambandi við, at Tórshavnar kommuna hevði sett tvey borðtennisborð upp í garðinum uttan fyri Betri Banka í miðbýnum. Øll, sum hava hug at fáa hitan og royna seg eina løtu, kunnu læna borðtennisbatt og -bóltar inni á Býarbókasavninum.

# Størv

Á Býarbókasavninum eru tilsamans 11,5 ársverk.

## Størv, ið eru ásett

Býarbókavørðurin er leiðari, 1. bókavørður er varaleiðari, 4 bókavørðir arbeiða fulla tíð, 2 bókavørðir ¾ tíð.

Skrivstovu- og avgreiðslufólk: 4 fulltíðarstørv eru ásett, og 6 starvsfólk arbeiða í hesum størvum.

Aftur at hesum eru eisini tímaløntir bókauppsetarar og feriuavloysarar.

Eisini eru skúlabókavørðir í starvi 2 tímar um vikuna á Kollafjarðar bókasavni og ein á Nólsoyar bókasavni.

Býarbókasavnið hevði fólkaskúlanæmingar í starvsvenjing á vári og á heysti 2021.

## Skiftisstarvsfólk



*Ungdómsbókavørðurin Jahn Fuglø var skiftisstarvi í samband við nýggju ungdómsdeldina. Hann arbeiðir vanliga á Kulturium í Ishøj.*

Sum liður í, at ungdómsbókasavnið spakuliga gjørdist veruleika, gjørdi Býarbókasavnið avtalu við Ishøj bókasavn um sonevnt starvsfólkaumbýti. Ungdómsbókavørður úr Ishøj varð settur í tíðaravmarkað starv á Býarbókasavninum í eitt hálvt ár, meðan bókavørður frá Býarbókasavninum var í starvi á bókasavninum í Ishøj sama tíðarskeið. Ishøj bókasavn hevur eina góða ungdómsdeild, har møguleiki var at fáa nýggjar royndir og íblástur á økinum, umframt at Býarbókasavnið fekk vegleiðing og íblástur til okkaru komandi ungdómsdeild.

# Skeið og førleikamenning

**15.- 17. februar**

## Fyrstuhjálparskeið

Reyði Krossur skipaði fyri fyrstuhjálparskeiði fyri øllum starvsfólkum á Býarbókasavninum.

**19 . mars**

## Dátuverndarlógin

19. mars var Býarbókavørðurin á skeiði á Hotel Brandan, har Tórshavnar kommuna skipaði fyri skeiði um dátuvernd v.m.

**8. juni**

## Marknaðarføring á netinum

Fimm bókavørðir vóru á íblástrardegi í Smæruni um strategiska vitan til marknaðarføring á netinum.

## Leiðslumenning

Alt árið var býarbókavørðurin á fleiri skeiðum um leiðslumenning, sum starvsfólkadeildin skipaði fyri fyri øllum leiðarum í Tórshavnar kommunu.

**5. oktober**

## Social media strategy

Tveir bókavørðir luttóku á verkstovuni "Social Media Strategy", sum var verkstova um brúk av sosialum miðlum

# Hini bókasøvnini í kommununi

## Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn

Telefon (skúlin): 421475
Teldupostur: kol@skulin.fo

Bygdar- og skúlabókasavnið er í skúlanum. Opið er fyri børn og vaksin í vetrarhálvuni (1. oktober til 31. mars) mikukvøld kl. 19-21, og í summarhálvuni (1. apríl til 30. september) mikukvøld kl. 19-20. Stongt er í summarfrítíðini hjá skúlanum.

## Nólsoyar bókasavn

Telefon (skúlin): 302466
Teldupostur: nolsoy@skulin.fo

Nólsoyar bókasavn er í somu hølum sum skúlabókasavnið. Opið er fyri børn og vaksin týskvøld kl. 17.00-19.00. Bókasavnið hevur stongt í summarfrítíðini.

## Skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu

| | |
|---|---|
| Útlán skúlar 2021: | 54.734 |
| Tilfar tilsamans skúlar: | 217.226 |